# BØNARLØTAN

Mars 2018 33. árg.

**1. Hósdagur** *Sálmur 120 og 121*



*Neil Summerton*



*Niels Pauli Nónstein*

**Leiðsluráðstevna 16.-17. mars í Betesda**

## Leiðsluráðstevna 16. - 17. mars í Betesda

Høvuðstalarar eru Neil Summerton og Simon Marshall úr Bretlandi og Niels Pauli Nónstein. Endamálið er at viðgera bíbilsku meginreglurnar fyri leiðslu í samkomuni og at geva íblástur at leiða samkomu Harrans í okkara tíð. Ráðstevnan er ætlað øllum í leiðslu ella sum á annan hátt kenna ábyrgd fyri samkomu Guds. Tilmelding hjá Kára Østerø tlf. 788117, kari_marin@hotmail.com, ella á Facebook bólkinum: Leiðsluráðstevna 16 & 17 mars 2018.



*Simon Marshall*

## KRINGVARPIÐ

**R7** (meir á www.evr.fo)
Sunnukvøld . kl. 20 . . .Kelduvaðið *(endursent hóskv. kl. 21)*
Týskvøld . . . .kl. 21 . . .Á torginum *(endursent sunnud. kl. 12.30)*

## Føroysk møtir í Jútlandi

3. mars kl. 19 føroyskt møti í Bethaniakirkjuni,
Dag Hammarskjøldsgade 2A, Aalborg.

## FØROYAR

### Else og Poul Jóhan Djurhuus



Møtini í Dansifrøi í Havn verða 3. mars kl. 19.30 og 4. mars kl. 18. Av tí at Svenning av Lofti og Jógvan Zachariassen eru bodnir til jarðarferð Billy Grahams, fer Poul Jóhan saman við øðrum at standa fyri møtunum. Ymiskir tónleikarar og sangarar luttaka, t.d. M.C. Restorff, Theodor Petersen, Magni Christiansen, Harmonikuliðið og Sangkórið í Ebenezer. Barnamøti verða í Dansifrøi 2. og 3. mars kl. 17 og ungdómsmøti 3. mars kl. 22. Barnatiltakið 2. mars byrjar við nátturða kl. 17. Høvi verður at ogna sær bøkur frá Bókasøluni Logos.

**– Birgit og Svenning av Lofti**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**

## FØROYAR

### Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi

Góðu Anna og Símun Pætur, Rói, Símun Pætur, Torkil, Silja og Teitur; góða Malena og familjur tykkara! Bønarløtan ber tykkum samkensluheilsan við Es. 40.29, nú Arnvør fór frá tykkum heim til Harra sín.

## *2. Fríggjadagur* *Lukas 20.27-47*

**DANMARK, Keypmannahavn, Kristnastova**
**Dora og Niels Pauli Nónstein (f)**
**Sigrid 10, Andreas 8, Kristina 6**

Niels Pauli undirvísir á Siloa-leguni í Zarepta 2. - 4. mars og á Mizpa-leguni 9. - 11. mars. Hann luttekur eisini á ráðstevnu um leiðslu í samkomuni í Betesda 16. - 17. mars.

**FØROYAR**
**Vanja og Svein í Prestgarði**
**Jenny 10, Svend 9, Terji 5, Petra 4**

2. - 4. mars ferðast vit við tónleikabólki og hava tiltøk í Salt í Trongisvági, á Reinsarínum í Havn og í Betesda í Klaksvík.

## *3. Leygardagur* *1. Sám. 24.1 - 23*

**USA, New Tribes Mission, Alabama**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**

Vit eru heimkomin í øllum góðum. Judy hevur tað gott nú. Takk fyri forbøn og hjálp. 4. - 11. mars skal eg tala í samkomu í Albany Georgia. Eg eri formaður í altjóða, leiðsluni hjá NTM, sum hevur nógva eyka ábyrgd við sær. Eisini fyrireiki eg meg til møtir fyri framman.

**ZAMBIA, Ndola, GLO**
**Nanna og David Lukama**
**Josiah 13, Micah 11, Ezra 9, Uhenya 6, Boas 4**

Vit eru takksom fyri tíðina heima í Føroyum og eru spent at fara aftur til verka. 5. mars kemur eitt nýtt toymi við uml. 20 næmingum. Biðið, at tey mennast her á GLO, og at vit verða teimum til signing.

## *4. Sunnudagur* *Gal. 1.1-24*



**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**

Av tí at vit skulu byggja eitt hús til starvsfólk og vóna at kunna taka ein part av tí í brúk í ár, byrja legurnar eina viku seinni enn vanligt. Tað verða tó sum vanligt fýra legur, ið byrja 5. juli og enda 31. juli. Tørvur er á leiðarum til gentur og dreingir, kokkum, náttarvakt, tónleikarum, ítriv og annað. Áhugað kunnu venda sær til m.o. Marjun Stauss Joensen, Leirvík, tel. 257069.

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

## *5. Mánadagur* *1. Sám. 25.1-22*



**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**

Eg hjálpi trúboðarum við rættlestri í Filipsoyggjum til síðst í mars. Cathy er eftir í Italia og er lærari hjá Noah.



**PAPUA NÝGUINEA,**
**Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen, Ísak 15**

## *6. Týsdagur* *Gal. 2.1-21*



### JAPAN
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 8, Nana 6, Louie 4**

Eina viku í mars samstarva vit við hini í OM Japan toyminum fyri at fáa andaligan íblástur og at læra at skipa arbeiðið. Biðið, at vit mennast og uppliva Guds leiðslu.

## *7. Mikudagur* *1. Sám. 25.23-44*



### MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro
**Hansy og Martin Tuohy**
**Isabel 13, Victoria 11, Emma Grace 10, Jónatan 8, Markus 5, Evita Linda 2, Joy Hanna 1**

Vit hava „Bright Lights“ bólk fyri gentur í samkomuni í aldrinum 8 ár og eldri. Endamálið er at menna tær at vera ljós fyri Harran. Eisini hava kvinnurnar ætlanir at møtast hvørja viku. Biðið um andaligan vøkstur.



### MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca
**Inga McKendry**

Vit gera framstig við umsetingini. Biðið um vísdóm og Heilaga Andans leiðslu, so allir toymislimir skilja Orð Guds. Biðið um trygga ferð, tá eg flúgvi til Skotlands 14. og 15. mars.

## *8. Hósdagur* *Sálmur 122 og 123*

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen, Adonia 10**
Biðið áhaldandi fyri Adoniu, sum hevði ringt herðindi eftir jól. Vit keypa nú serstakan úrdrátt úr Danmark, sum vónandi kann hjálpa henni. Biðið eisini fyri møtum og framløgum í vár.

## *9. Fríggjadagur* *Gal. 3.1-29*



**DANMARK, Keypmannahavn**
**Susan og Øssur Berghamar**
Vit gleðast um tey mongu ungu, sum fús taka lut í vitnisburði, sangi, bøn og í ymiskum øðrum uppgávum í Kristnastovu. Biðið, at tey støðugt mennast og koma varðveitt gjøgnum útisetatíðina.

**DANMARK, Måløv**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Eva 17, Miriam Joy 14, Noah 11, Lydia Sigrid 0**

## *10. Leygardagur* *Sám. 26.1-25*



**ONGLAND, NTM North Cotes**
**Erla og Ingvard Petersen, Natan 15**
Reach ungdómsstevnan verður 23. - 25. mars við umleið 200 luttakarum í aldrinum 16 - 30 ár. Biðið fyri teimum tólv, sum koma úr Føroyum. Endamálið er at upplýsa ung menniskju um framhaldandi tørvin á at bera teimum gleðiboðskapin, sum enn ongantíð hava hoyrt.

## *11. Sunnudagur* *Gal. 4.1-11*



**DANMARK, Kolding**
**Jan og Anne Zachariassen**

Vit verða heima allan mars. Fara síðan til Keypmannahavnar og Fredericia. Biðið, at vit fáa neyðuga nýggja útgerð til videoredigering, tvs. nýggjan iMac, tí okkara MacBook er lítil og slitin.

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**



**FØROYAR**
**– Annika og Poul Færø**
**– Maria og Jens Bech**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**

## *12. Mánadagur* *1. Sam. 27.1-12*



**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Elizabeth 12, Rebekah 10, Lydia 7**

Takkið Gudi, at kurdiska app-Bíblian Pertukekem longu er tikin niður meir enn 2500 ferðir, mest í Irak. Sending við nýggjum Bíblium liggur afturhildin í tollinum í Suðurirak. Fleiri samkomur bíða eftir teimum.

**FØROYAR**
**– Lis Zachariassen**
**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Elin og Jógvan Jacobsen, Boas 10**

## *13. Týsdagur* *Gal. 4.12-31*



**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**

Nýggja viðgerðin hjá Annu hevur virkað væl. Hon er nú før fyri at gera mat, ið annars ikki hevur borið til í fleiri ár. Vit umhugsa at vitja í Senegal í juni.

**ONGLAND, NTM North Cotes**
**Julie og Sonni Poulsen**

## *14. Mikudagur* *1. Sám. 28.1-25*





**GRØNLAND, Nuuk**
**Hans Sivertsen**
**Filip og Ane Sivertsen, Cecilie 14, Kristian 12**
**Óli og Anne-Sophie Tindalíð, Liljan 12, Leanna 11**

Legurnar byrja 24. juni og halda á 4 vikur fram. Okkum tørvar hjálp úr Føroyum; tilmelding Karsten tel. 237297, Victoria tel. 272376 og Mari tel. 264774. Ætlanin er at fara úr Føroyum 1. juni at gera arbeiðið við vatnturbinuni liðugt og annað viðlíkahald. Upplýsing Thorvald tel. 519191. Biðið, at Immanuel fær nóg nógva manning í summar. Upplýsing Jonhard tel. 267908 ella Marcus tel. +299 486447. Kunning verður send Akrinum og samkomunum, og upplýsing sæst á facebook „Naalersitaq".

⋆ Í dag fyllir Kristina Nónstein 7 ár.

## *15. Hósdagur* *Sálmur 124 og 125*



**SKOTLAND, Motherwell**
**GLO, Tilsley College**
**Dorit og Simon Marshall**
Simon luttekur á leiðluráðstevnu í Betesda 16. - 17. mars.

## *16. Fríggjadagur* *Gal. 5.1-26*

**NTM FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 7, Tabita 4, Debora 2**
23. - 28. mars luttaka 12 føroyingar á Reach og vitja samstundis North Cotes College í tveir dagar eftir ráðstevnuna. Annika W. Ljósheim er ferðaleiðari. Trúboðarar krevja í meðal 2-3 ár at læra seg nýtt mál og mentan, um teir skulu megna at bera ættarbólkum gleðiboðskapin. Biðið tí, at teir ikki gevast!
⋆ Í dag fyllir Evita Linda Tuohy 3 ár.
⋆ Í dag fyllir Lydia Sigrid Berghamar 1 ár.

## *17. Leygardagur* *1. Sám. 29.1-11*



**KANADA, Good Seed International**
**Judith og Allan Ellingsgaard**
**Benjamin 14, James 11, Micha David 8**
Vit hava avgjørt at gevast í GoodSeed, men verða búgvandi í Kanada. Eg havi søkt inn á læraraskúla í juli. Judith er um at vera liðug við tvey ára eftirútbúgving innan undirvísing. Vit koma til Føroya í juni. Vit eru so takksom, at tit hava stuðlað okkum so trúføst í bøn, og eisini andaliga og fíggjarliga hesi skjótt 10 árini, vit hava verið í tænastu Harrans her.

## *18. Sunnudagur* *Gal. 6.1-18*



**ITALIA, Sant'Elia**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Noah 15, Megan 13,**
**Trisha 5, Emma 1**

Megan og Trisha hava nú fingið danskan ríkisborgararætt! Hetta hevur verið long og strævin bíðitíð. Tað eru trý ár, síðani tær gjørdust partur av familjuni, og nú sleppa tær endiliga til Føroya. Vit koma øll heim í summar.

**RUSSLAND, Moskva**
**Guðrun og Ivor Tutty**
**Sonja 17, Timothy 17, Karina 16**

## *19. Mánadagur* *1. Sám. 30.1-31*



**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Anna og Hans Djurhuus**

Annanhvønn hósmorgun kl. 9.30 er løta fyri kvinnur, sum koma saman til ymisk handalig ítriv, og annanhvønn hósmorgun kl. 10 hittast menninir til hugnaløtu. Kunning á +45 98944370.



**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**

**VENESUELA, Puerto Ayacucho**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

## *20. Týsdagur* *Filemon 1-25*

**USA, Nebraska, New Tribes Mission**
**Rachel og Peter Hansen, Caleb 15**
Eg fari til Papua Nýguinea 21. mars - 8. apríl. Pálmasunnudag og á páskum er ætlanin at hava samfelag við brøður og systrar okkara í Mangseng; síðan fari eg á NTM leiðarafundir. Mær tørvar vísdóm at vera mangseng samkomunum til signing og at hjálpa leiðsluni hjá NTM í PNG.

**PAPUA NÝGUINEA, Mengen, Lele**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 9, Noah 8, Karis 4, Judah 2, Ethan 0**

## *21. Mikudagur* *1. Sám. 31.1-13*



**TÝSKLAND, Hückeswagen, NTM**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 6**
Í Týsklandi samskipar Benjamin stutttíðar trúboðaravirksemi. Vit senda fólk at hjálpa langtíðar trúboðarum, m.a. á skúlum og á trúboðaramarkini. NTM North Cotes í Onglandi hevur tørv á starvsfólki á fleiri økjum.

**FRAKLAND, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen, Sarah 7, Leah Eve 4**
⋆ Í dag fyllir Trisha May Guttesen 6 ár.

## *22. Hósdagur* *Sálmur 126 og 127*



**PAPUA NÝGUINEA, Madang**
**Natalie og Philip Hansen, Louis 0**
Vit gleða okkum aftur í ár at undirvísa í Bíbliuni á báðum skúlunum, har vit undirvístu í fjør.

## *23. Fríggjadagur* *Lukas 21.1-19*



**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**
Missiónsstevnan eydnaðist sera væl! Nú fyrireika vit páskamøtini. Biðið fyri møtunum og Guds Orði, sum John skal bera fram, sangkórinum og orkestrinum.

## *24. Leygardagur* *2. Mós. 29.22-46*



**TEILAND, CHIANG MAI**
**Christy og Dan Jacobsen**
**Justin 16, Jonathan 15, Leslie 15,**
**Emily 7, Bethany 3**
Vit eru liðug við fyrsta stig í okkara mállestri. Tað hevur tikið eitt sindur longri tíð enn vanligt. Áðrenn vit byrja á øðrum stigi, skulu vit hava samrøðu um mentan við okkara málráðgeva. Okkum tørvar vísdóm at finna røttu mentanarevnini, sum verða leiðbeinandi fyri málundirvísingina á øðrum stigi. Vit skulu hava 40 stig íalt.

## *25. Sunnudagur* *Lukas 21.20-38*



**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**

Efesusbrævið og 1. Korintbræv vórðu kannað í febr. og eru nú góðkend til prentingar. Ætlanin er at kanna Rómbrævið, 1. Timoteusarbræv og Titusbrævið síðst í mars ella fyrst í apríl og fáa tey góðkend. Erik undirvísir í Efesusbrævinum, og bíbliutími er nú hvørt kvøld frá mánakvøldi til fríggjakvøld. Nøkur, sum komu fyrr, koma nú aftur. Biðið, at tey halda á, og at Harrin dregur enn fleiri til sín.

## *26. Mánadagur* *2. Mós. 30.1-16*



**GUINEA VESTURAFRIKA,**
**Tarencha, Nalu**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Jens Allan 16, Ryan 8**

Hans Arni hevur í nakrar vikur verið til kanningar í Wisconsin, USA, tí hann í eitt ár hevur verið ovurtroyttur og havt svimbul. Sjúkrahúsið er partur av virda Mayo Health System, og starvsfólkini hava nógva vitan og drúgvar royndir. Hóast Hans Arni hevur verið til eina røð av kanningum, er tó enn ongin greið diagnosa staðfest. Frítíðararbeiðið í Nalu fyri børn og ung 10-14 ár endaði í hesum umfari í febr. Minnist børnini, tí tað er ikki lætt at vaksa upp á bygd í Vestur-afrika.

**GRØNLAND, Juvel II**
**Anna og Óli Steinberg**

## *27. Týsdagur* *Lukas 22.1-23*



**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**

Solveig fer nú at søkja um amerikanskan ríkisborgararætt. Vit eru takksom, at nóg nógvur peningur er komin inn til eyka brennievni til bátin. Minnist til restina av fíggingini og sjálvan túrin úr Kanada til Grønlands í juli.

## *28. Mikudagur* *2. Mós. 30.17-38*



**FILIPSOYGGJAR, Naplud**
**Monika og Tim Sharp**
**Ragnhild 14, Rebekka 12, Hanna 9**

Tim umsetir ymiskar kapitlar úr 4. Mósebók, fyrst kendu søgurnar og brotini. Biðið um áhaldni og vísdóm at umseta rætt.

**FILIPSOYGGJAR, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen**



★ Í dag fyllir Lydia Niclasen 8 ár.

**Útgevari:** KBS (Kristniboðssambandið)
**Blaðnevnd:** Róland í Skorini, ábyrgd, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Selma Godtfred, Kristianna J. Heinesen, Jónvør Christiansen, Lea Wolles, Barbara og Ragnar Vest, Hanna og Sigurð Ó. Vang.
**Avgreiðsla:** Óla Hendrik av Fløtum, yngri, tel. 227057.
**Uppseting:** Palli Skorheim, tel. 290087.
**Myndasavn:** pallis76@yahoo.dk

## *29. Skírhósdagur* — *Sálmur 128 og 129*



**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Eli 13, Aron 6, Noah Kristian 4**

Forfylgd trúgvandi úr Pakistan hava í eina tíð søkt sær skjól í Teilandi, men stjórnin ætlar at vísa teimum úr landinum aftur. Tey liva tí fjald, og fleiri teirra koma í okkara samkomu at søkja sær hjálp.

## *30. Langi fríggjadagur* — *Lukas 22.24-46*

**OM FØROYAR**

Vit eru takksom, at Mini TeenStreet gekk so væl, og at nógv komu til tiltakið. Tilmeldingin til TeenStreet og onnur summartiltøk eru byrjað. Riverboat verkætlanin hevur gingið væl. Í apríl fer Rannvá Mortensen úr Havn á STEP-skeið í USA í 3 mánaðir, og í mai fer Anna Betta Olsen úr Fuglafirði á STEP-skeið umborð á Logos Hope í 3 mán.

**Anita og Oddmar Tausen**

Væntandi verða vit leiðarar á TiM Albania toyminum í summar. Vit eru spent at arbeiða saman við 12 ungum í aldrinum 15-18 ár, sum ynskja at uppliva 10 dagar í missión í Albania.

**Prent:** Føroyaprent, tel. 314555.
**Teldupostur:** prayerservicefo@gmail.com
**Heimasíða:** www.kbs.fo

**©KBS.** *Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.*

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

## *31. Páskaaftan* *2. Mós. 31.1-18*

### BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum, Logos Hope og Bókasøluni Logos!

**Nýggj bók frá Logos!**




**Dråber fra en utæt vandhane George Verwer**

**149 kr.**

Klassisk George Verwer-bók er júst komin á donskum. Samstundis sum George greiðir frá langa lívi sínum í OM, viðger hann eisini, hvussu Gud virkar gjøgnum ófullkomnar persónar, og tekur seg sjálvan sum dømi. Hann lýsir samverkamenn í samkomutænastu og -leiðslu, t.d. Dale Rhoton, Peter Maiden og Willam MacDonald, sum hava verið hansara fyridømi.

Opið gerandisdagar kl. 14-18,
leygardag kl. 12-16.
Tel. 312372 / 282372 www.logos.fo

BÓKASØLAN logos